Skrivligur fyrispurningur
§ 52a eftir Tingskipanini

Spyrjari: Terji Beder, løgtingsmaður

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Sjúklingatrygd og journalisering av heilsudátum fyri viðgerðir í Danmark

Spurningar:

1. Hví kunnu fólk, sum eru búsitandi í Føroyum, ikki brúka sítt egna p-tal ella cpr-tal, tá tey fáa sjúkrahúsviðgerð í Danmark, men mugu í staðin noyðast við eitt fyribils cpr-tal?
2. Hvat merkir tað fyri sjúklingatrygdina hjá føroyskum sjúklingum, tá journaliseringin verður løgd afturat einum fyribilspersónstali?
3. Verður nakað gjørt fyri at tryggja, at journalin, sum er knýtt at fyribilstalinum verður førd inn í journalirnar hjá sjúklinginum, sum eru knýttar at p-talinum í Føroyum og cpr-talinum í Danmark?
4. Verður nakað gjørt fyri at tryggja samanhang ímillum journalirnar í Danmark og í Føroyum?

Viðmerkingar:

Tá føroyingar, sum eru búsitandi í Føroyum, fáa sjúkrahúsviðgerð í tí danska heilsuverkinum, fáa teir eitt fyribils cpr-tal, óansæð um teir hava eitt danskt cpr ella ikki. Hetta ger, at journalin, sum verður førd fyri viðgerðina, ikki verður knýtt at tí vanliga cpr-talinum, og tí ikki verður løgd afturat tí journalini, sum annars er knýtt at cpr-talinum hjá sjúklinginum.

Hetta merkir, at týðandi upplýsingar um sjúku og sjúkragongd enda uttanfyri ta vanligu skrásetingina, sum føroyskir sjúklingar annars hava knýtta at sínum persónstali.

At týðandi upplýsingar um sjúku verða hektaðar av journalini hjá fólki tykist mær sera álvarsligt, tí støður kunnu eyðsæð koma fyri, har upplýsingar frá hesum viðgerðum kunnu fáa týdning í øðrum viðgerðum. At hesar upplýsingar ikki verða skrásettar eftir teirri vanligu journalini ger eisini, at ein óneyðuga stór ábyrgd verður løgd á tann einstaka sjúklingin, sum tá bæði skal minnast og skilja ta sjúkugongd, viðkomandi hevur verið ígjøgnum.

Á Løgtingi, 23. oktober 2025

Terji Beder